# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Ungdómslistastevna

Enn grør um gangandi fót verður oftani tikið til. Og hetta mugu vit sanna, tá tað kemur til list og mentan í hesum landi. Hóast mong myrk skíggj og hóast almenna orðaskiftið ella keglið er rættiliga nógv merkt av klanduri og skuldsetingum og oftani lítið konstruktivt og uppbyggjandi, so eiga vit framvegis eitt virkið lista- og mentanarlív. Og hetta kemur til sjóndar hvønn dag kring alt landið. Eitt av hesum spírandi og livandi tiltøkunum er ungdómslistastevnan, sum verður 26. til 28. februar í Norðurlandahúsinum. Stigtakararnir gera í dag vart við, at tekningarfreistin er úti fríggjadagin.

Undir heitinum "Ung í Føroyum 2010" kunnu øll ung í landinum, sum hava listarlig áhugamál ella fáast við eitthvørt, ið hevur við list at gera, koma og hitta onnur, sum hava somu áhugamál og læra nýtt av hvørjum øðrum og av kendum føroyskum og útlendskum listafólkum. Er man fyltur 13, men enn ikki 19 og spælir tónleik, sjónleik, málar, dansar, skrivar ella okkurt heilt annað spennandi, so er hetta staðið at vera verður sagt í fráboðan.

Ung í Føroyum er fyri øll ung, sum eru listarliga áhugað, bæði til tey royndu, tey, sum júst eru byrjað ella til tey, sum ætla sær í gongd. Á stevnuni ber til at royna nýggjar leiðir og mennast innan mong listaøki, men tað ber eisini til at royna okkurt annað enn tað man fæst við til dagligt. Her kunnu ung hitta onnur ung, sum fáast við tað sama, hitta javnlíkar og eisini síggja, at alt ber til – bert hugflogið setur markið siga stigtakararnir.

Fjølbroytt skrá er fyri stevnuna. Har verður listaframsýning og sýning av teimum tónleika-, sjónleika-, dansi- ella filmsverkunum og øðrum luttakararnir sjálvir hava fyrireikað frammanundan. Arbeitt verður í verksmiðjum allan dagin við spennandi yrkislistafólkum sum vegleiðarar. Um kvøldið er hugnakvøld og opin pallur. Stevnan endar við eini stórari framsýning, har almenningurin hevur atgongd. Til at leggja teimum ungu lag á og samskipa tiltøkini eru fleiri kend og sera virkin føroysk listafólk.

Vit kunnu bara vóna, at listastevnan fyri ung verður eins væl eydnað sum tær undanfarnu. Hetta er eitt frálíkt tiltak, tí tørvur er í føroyska samfelagnum at fokusera meira uppá tey ungu, sum hava áhuga fyri list. Vit vita øll, hvussu nógv orka fer til annað ungdómsarbeiði, sum eisini er óført, eitt nú á ítróttar- og til andliga økinum. Men vit mugu so sanniliga ikki gloyma listina. Gott í tykkum, sum skipa fyri. Og eingin ivi er um, at her verða týðandi spírar lagdir. Og hvør veit um ikki fleiri av hesum ungfólkum ein dag í framtíðini verða okkara listarligu kyndlaberarar. Tað hevur so ómetaliga nógv at siga, at tey ungu verða hildin til. At eisini tey hava umstøður at brúka síni evni. At tey vaksnu eru um tey og stuðla teimum. At fakfólk og listafólk geva teimum íblástur.

Aftur her kemur okkara kæra Norðurlandahús til sín rætt. Her eru karmar, sum vit øll kunnu hava gleði av. Ung í Føroyum 2010 listastevnan er so bara eitt av mongu tiltøkunum, sum Norðurlandahúsinum er karmur um. Góða eydnu.

**Sosialurin**

## Enn einaferð Fuglafjørður….

**JÓHAN HERI JOENSEN**



Fyrr í hesum mánaðinum hevði eg eitt skriv um Fuglafjarðar býráð, har eg gav teimum av grovfíluni. Satt at siga so roknaði eg við, at eg fór at fáa afturmeldingar til sera hørðu ábreiðslurnar, men eg var onga løtu bangin fyri atfinningum, tí hvørt eitt orð í skrivi mínum varð satt, og eg vil til einhvørja tíð taka ábyrgd av hvørjum orði sum skrivað er.

Eg ætlaði, at persónarnir skuldu verða neutralir, teir vóru býráðslimir, og meiningin varð ongantíð at taka nakran einstakan persón burturúr, tí ábreiðslan varð vend móti øllum 9 í býráðnum, men tá Kristina Toftegaard í lesaraskrivi roynir at vaska dusti av herðum sínum og tveita alla sína ábyrgd á hini, sum sitið hava, við tí eina endamáli, at misnýta skriv mítt í landspolitiskum stemmufiskaríið, tá haldi eg, at farið er um mark.

Kristina tú kanst verja teg við, at tú bert hevur sitið í býráðnum í 13 mánaðir. Til tað er bert at siga - tíbetur so hevur tú bert syndirnar fyri seinastu 13 mánaðirnar at bera á tínum herðum – men tað er skeivt at tveita tína ábyrgd á herðarnar hjá hinum 8 býráðslimunum. (Og legg tær í geyma, at Kvinnuflokkurin hevur sera tyngjandi ábyrgd av øllum 5 ólukkuárunum).

Tað er ikki neyðugt at vera serfrøðingur á nøkrum øki fyri at síggja, at endamálið við skrivingini, har ábyrgdin verður slett av egnum herðum, er fyri at seta eina landspolittiska goggulínu.

Teir 13 mánaðirnir geva tær so avgjørt onga gloriu á høvdið.

Skeiðið byrjaði við, at tú gavst tilboðið um at gerast borgmeistari frá tær, tí tú heldur vildi røkja títt borgarliga starv. Í mínari verð er hettar ein beinleiðis háðan av borgaranum, sum gav tær atkvøðuna og álit sítt. (Einhvør onnur samgonga kundi bert verið betri, enn sitandi samgonga, tí hon er stórt sæð tann sama sum undanfarna, einasti munur er – Kristina Toftegaard er komin fyri Jón Nolsoe Olsen).

Tú lovaði opinleika og gjøgnumskygni. Hvar er tað blivið av?

Tú lovaði at arbeiða fyri teimum bleytu virðunum. Eisini her – skralltóm orð.

Tú hevur (sum samgongulimur) góðtikið, at kontoin til Ellisheim bleiv neyðtikin.

Tú hevur góðtikið, at tað eina prosentið framvegis verður misnýtt.

Tú góðtók, at bilarnir hildu áfram at flyta Lambareiðið inn í bládýpi í Fuglafirði – (tað varð figgjarkreppan, sum steðgaði hesum ørskapi).

Tú góðtekur at selja ognirnar hjá kommununi fyri dumpingprís.

Tú ert við til at skrotta tað langtíðarætlan sum løgd varð fyri Fuglafjarðar skúla.

Tú góðtók nógvar sparingar – á bleyta virðisøkinum - á figgjarætlanini, samstundis sum samsýningarnar til býráðslimirnar er hækkað, og kommunala umsitingin hevur fingið meira pening um hendi, sjálvt um fleiri eru søgd úr starvi, og onnur eru farin niður í løn.

Tú ønti ikki aftur táið eg, bað teg ”face to face” um at svara uppá fyrispurning mín um sølu av tunnlunum.

Ongantíð áður hevur opinleikin verið so innistongdur sum nú.

Kunningin er, vist eisini, ein býur í Kina. Hetta er hent, meðan tú hevur sitið við ábyrgd. Eg spyrji bara. Hevur tú góða samvitsku av hesum ábreiðslum???

Nú skúlin verður nevndur, í tínum skrivi, so má eg lýsa tað málið eitt sindur betur.

Tann skjótt 30 ára gamla ætlanin at flyta framhaldsdeildina út á Kambsdal vísti seg ikki at bera á mál, tí varð ein langtíðarætlan løgd fyri skúlan í Fuglafirði í 1997, og fyrsta byggistig varð framt í verki. Framhaldsdeildin hevur tí í dag nøkunlunda umstøður sum er, men barnaskúlin húsast framvegis í einum pjøssaðum”miðaldarligum umhvørvi.”

**Trupulleikin, í Fuglafirði, er ikki framhaldsdeildin men barnaskúlin.**

Eg tími ikki at greina út trupulleikarnar í tí gamla bygninginum. Eg haldi, at eg bert endurtaki meg sjálvan. Men tann, sum ynskir tað, skal fáa vegleiðing frá mær persónliga, tlf 737810.

Tað verður einki bygt á Kambsdali fyrrenn Gøtu og Leirvík eru við. Vit hava (í umleið 30 ár) bíðað, og bíða framvegis eftir útmelding frá Eysturkommunu. At teir eru áhugaðir einaferð í framtíðini, tað kann barnaskúlin ikki bíða eftir. Eg skilji eisini væl Eysturkommunu! Hví skullu teir nýta eina ørkymlandi milliónaupphædd til ein skúlabygning á Kambsdali. Teirra næmingar hava tað gott sum er í Fuglafirði, og tað skal eisini verða teimum væl unt.

Eg havi persónliga einki ímóti at flyta framhaldsdeildina út á Kambsdal, um tað verður gjørt her og nú, men ein ætlan, sum liggur onkustaðni í framtíðartokuni – Gloymið tað. Tað er í dag okkara barnaskúli hevur brúk fyri eini loysn.

Vælsignaði. – Skrottið innihaldsleysa tosið um frammhaldsdeild einaferð í frammtíðini

Takið verðuleikan og nútíðina til viðgerðar.

Komið til verka og avtaki einkisigandi nevndir.

Fleiri av býráðslimunum havi eg persónliga virðing fyri hóast harðar politiskar ábreiðslur, ábreiðslurnar eru politiskar og ikki persónligar. Eg havi altíð verið kontantur, eisini í mínum býráðsarbeiðið.

Kristina:
Tú endar skriv títt við at siga :” Vit hava næstu árini tørv á at hugsa meira jaligt, og at standa meira saman”. Meinar tú verðuliga, at borgarin bert skal nikka og sita ”jaligur” og trilla tumlar, samstundis sum skattapeningurin verður so illa umsitin, sum prógv er fyri í Fuglafjarðar kommunu seinastu 5 árini. Nei, Kristina. Tað er tíverri alt ov fá, sum lamma nevan í borðið. Um tú við hesum meinar, at vit skulu gevast við kritikki og føstum meiningum. So situr tú í skeivum stóli. Ullintar og hálar meiningar byggja einki upp. Erligur kritikkur og fastar meiningar kunnu saktans flyta fjøll.

Eg haldi best hevði verið at tú dregur innaftur landspolitisku gággulínuna og setur hana aftur í frystaríið. Tú kanst taka hana fram aftur, táið løgtingsvalið nærkast.

NB:
Nevndir flyta eingi mørk. Tað er politikarin, sum stendur aftanfyri, sum er drívmegin.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo
Svein Rógvi Nielsen Ljósstein sveinrogvi@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.